# Gamla gardan kom í finaluna

**Semifinalan í Prix Føroyar kappingini var leygarkvøldið. Hetta gjørdist tættur dystur millum tey, sum vóru komin so langt. Og her var talan um nýggj nøvn og gamlar kenningar. Men gamla gardan kom víðari, meðan yngru bólkarnir fóru við ymsu festival-plássunum**



PRIX 2005
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Prix Føroyar semifinalan í Trongisvági leygarkvøldið var eitt stórsligið og væleydnað tiltak. 8 bólkar høvdu tryggjað sær pláss í semifinaluni. Harav var bróðurparturin royndir og dugnaligir tónleikarar, meðan yngri tónleikarar eisini taldust millum teir leikandi.

Flestu miðlarnir í landinum vóru á staðnum og Svf sendi beinleiðis. Teir hava bert sent prix undanumførini á netinum og er tað annars ikki hent ofta, at sent hevur verið beinleiðis sjónvarp úr Suðuroynni. Men nýggj tøkni ger, at tað nú ber til.

Lama Sea, All That Rain, Lawetz, Makrel, Kristleif Zachariassen, Go Go Blues, Terji Rasmussen Band og Eyðun Nolsøe & Showmenn fóru á pall. Og bólkarnir syrgdu fyri, at talan bleiv um ein tónleikadyst, har vónleyst var at spáa um úrslitið.

Men tá avtornaði var tað sum heild gamla gardan, ið stóð eftir. Eyðun Nolsøe og Showmen, Terji Rasmussen Band og Go Go Blues eru tey 3 nøvnini, ið sleppa víðari og til finalauna, ella Atlantic Music Event í Norðurlandahúsinum, tann 23. apríl.

Hinvegin skuldu føroyskir konsertfyriskiparar eisini velja sær bólkar úr semifinaluni at spæla á teirra pallum í summar.

FUT valdi sær Lama Sea at spæla á Ólavsøkukonsertini, Lawets skal spæla á Summarfestivalinum í Klaksvík og Makrel á G-festivalinum í Gøtu. Mentanarhúsið í Fuglafirði valdi sær at Lama Sea og Terja at spæla saman við einum norskum bólki tann 16. apríl.

Sostatt vóru tað stórt sæð yngru bólkarnir, sum struku avstað við festival-plássunum.

Eitt væleydnað tiltak leygarkvøldið, har øll fingu sítt, ongin kundi spáa um úrslitið og metingarnar um, hvørt úrslitið var tað rætta eru helst líka nógvar, sum samansetingarmøguleikarn ir við teim 8 bólkunum og trimum vinnarunum eru.

Sosialurin hevur stóra frásøgn frá prix semifinaluni í blaðnum í morgin.

# Sigrid og stjørnuskot hugtóku





**Ung Stjørnuskot vitjaðu fríggjadagin Suðuroynna, har tey høvdu eina rimmar skúlakonsert undir best hugsandi umstøðum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir: D.Olsen*

Fríggjamorgunin vitjaðu Sigrid Sivertsen og hennara Ungu Stjørnuskot í Suðuroynni, saman við tónleikabólki og bólkinum Paradox.

Hetta var konsert fyri skúlaungdómi í Suðuroyni. Ungdómi á sama aldri, sum tey á pallinum. Kórið hjá Sigrid sang eina røð av yngri og eldri vælswingandi slagarum, meðan ungir og dugnaligir tónleikarar leiktu undir. Eisini soslosangur var á skránni. Bólkurin Paradox kom eisini á pall og leikti. Sangarin í Paradox fekk tann lokala sangaran Brand Enni at hjálpa sær við einum lag.

Øll komu hesi sera væl frá framførslunum. Og stuttligt var, at alt fór fram við bestu ljóð- og ljósútgerð, tí sett var júst upp til stóru Prix Føroyar semifinaluna í høllini í Trongisvági.

Tá øll hesi ungu stjørnuskot høvdu víst hvat tey megnaðu, og tað var ikki smávegis, var eitt nýkomið punkt á skránni, tí ein gentubólkur á Tvøroyri undir leiðslu av Tróndi Enni slapp at enda framførsluna og komu tær somuleiðis væl frá hesum.

Ungdómar í Suðuroynni og úr miðstaðarøkinum hittust og tónleikurin ljóðaði undir best hugsandi umstøðum.

## Eivør á filmi

**Eivør Pálsdóttir er við í filmi um íslendsku heimsstjørnurnar. Filmurin verður frumvístur kring heimin tann 7. apríl**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tann 7. apríl verður ein filmur frumsýndur kring heimin, har Eivør Pálsdóttir er við. Hetta er dokumentarfilmur um tær íslendsku alheimsstjørnurnar, sum t.d. Bjørk, Sigur Rós, Minus, Múm, Quarashi, Bang Gang og eisini føroysku Eivør.

Filmurin nevnist Screaming Masterpiece og tað er Ergis Filmproduction og Zik Zak Films, ið hava framleitt. Filmurin var við á filmfagnaði í Svøríki í februar og varð innstillaður til fyrstu heiðursløn.